


**Nr. 9** *23. apríl 2023* **83. árg.**

# Kraftin í gleðiboðskapinum

Ein norskur prestur greiðir frá, at seint eitt kvøldið ringdi onkur uppá heima hjá teimum. Prestur fór út og læt upp. Ein tilkomin maður stóð á trappuni og segði, at hann vildi so fegin blíva frelstur.

Prestur bjóðaði honum inn og segði: „Ja, so mást tú biðja."

„Biðja?" segði maðurin. „Eg havi ongantíð í lívinum biðið, og eg havi heldur ikki hoyrt nakran, sum eg kenni, biðja. Eg veit ikki, hvat ið eg skal siga."

„Íðan, halt so saman hendur, og tak hvønn setning upp eftir mær."

Prestur byrjaði so frelsubønina:

„Takk, Jesus, at tú doyði fyri meg.
Nú gevi eg tær mítt lív.
Ver mín Harri og Frelsari. Amen."

Maðurin tók orðini upp eftir presti, og tá ið hann hevði sagt Amen, spurdi hann: „Eri eg nú umvendur?"

„Ja, tað ert tú. Jesus sigur: Tann, sum kemur til mín, vil eg als ikki reka burtur." Jóh. 6,37.

Maðurin fór glaður avstað, og prestur gloymdi alt um hann og helt seg ikki hava gjørt nakað serligt. Men eitt ár seinni ringdi aftur upp á dyrnar. Sami maður stóð uttanfyri. „Kennir tú meg aftur?" spurdi hann. „Nú havi eg í eitt ár roynt at livað sum ein kristin, og nú havi eg tikið hesi fólkini við mær, tí tey vilja eisini blíva frelst." Uttanfyri stóðu kona hansara, fyrrverandi konan, brøður hennara og børn teirra, seks persónar til samans.

„Við Guds hjálp vit skulu stórverk vinna." Sálm. 108,14.

*Effie Campbell* umsetti.

# Tvær tekningar

Seint eitt kvøldið bankaði ein maður á dyrnar hjá einum trúboðara og spurdi, um hann kundi fara á sjúkrahúsið at vitja vermóðurina.

Trúboðarin játtaði, og dagin eftir fór hann avstað. Konan var ógvuliga sjúk og lá at doyggja.

„Hevur tú nakrantíð verið á møti?" spurdi trúboðarin.

„Bara eina ferð, og tað eru mong ár síðani."

„Íðan, minnist tú nakað av tí, ið har varð sagt?"

„Ja, er tað ikki okkurt við, at Harrin hevur teknað teg niður í hond sína?" spurdi konan.

„Jú. Tað stendur í Jesaja 49, vers 16. Hann hevur ikki bara eina tekning av tær. Hann hevur tvær tekningar, tí skrivað stendur: „Hygg, í báðar hendur Mínar havi Eg rist (t.e. teknað) teg." (V.D. ums.)

„Eg bað so frelsubønina við henni," greiðir trúboðarin frá, „og hon fann friðin og gleðina í Gudi. Stutt eftir doyði hon."

*Effie Campbell* umsetti.

# Jesus doyði fyri meg

Beint áðrenn hin kendi prædikumaðurin Spurgeon doyði, kom ein vinmaður at vitja hann. Teir tosaðu saman um tey ymsu rákini í teologiini nú á døgum. Tá segði Spurgeon: „Mín teologi er vorðin ógvuliga einføld. Hon kann sigast við fýra orðum. Fyri ein prædikumann kann hetta tykjast í so lítið, men í deyðanum er hetta nóg mikið: Jesus doyði fyri meg."

*e.c.* ums.

# Tú ert ongantíð einsamallur

Ein maður vitnaði á missiónsvikuni í Havn 2007. „Sjálvt um tú ert staddur í mannamúgvu og ert saman við nógvum fólkum, so kanst tú kenna teg so einsamallan. Eg hevði leingi stríðst við henda spurningin, og hann nívdi meg.

Ein dagin fór eg ein túr yviri við Strond. Eg setti bilin og fór til gongu út á Boðanes. Eg hugdi allastaðni kring meg; men har var ikki eitt menniskja, og tí fór eg at biðja hart, tí tað fellur mær best.

„Góði Gud, nú mást tú svara mær. Tá ið eg kenni meg einsamallan, eri eg so veruliga einsamallur, ella ert tú eisini tá

við mær? Góði Gud, svara mær, áðrenn eg eri komin til endan á hesi smølu gøtuni."

So helt eg áfram at ganga og kom til tveir stórar steinar, sum stóðu saman. Tá sá eg, at ein sodavatnsfløska úr plasti lá har, og okkurt var í henni. Eg tók hana upp og skrúvaði lokið av og togaði hetta út úr henni. Hetta er eitt andaktsstykki, sum er klipt út úr einum blaði og lagt í ein plastlumma og rullað saman sum ein sigar, og síðani eru tvey klips sett í.

Tá ið eg breiddi hetta arkið út og las yvirskriftina, stóð har: **Tú ert ongantíð einsamallur!** Tá fór eg at lova og prísa Gudi fyri hansara stóra kærleika og umsorgan. Hann hevði svarað mær beinleiðis upp á mín spurning. Prísaður skal hann vera. Æra veri hansara heilaga navn."

Tá ið hesin maðurin hevði sett seg niður aftur, sprakk ein annar maður upp og segði: „Eg hevði ikki ætlað mær at sagt nakað í kvøld; men nú kenni eg, at eg má. Eg eri maðurin, ið legði hasa fløskuna har. Eg havi ikki klipt hatta stykkið út og lagt tað í fløskuna; men eg fann hasa fløskuna við hasari andaktini í á einum heilt øðrum staði. Tá ið eg hevði lisið stykkið, fekk eg eina sterka kenslu innan í mær, at eg skuldi leggja fløskuna niðri á Boðanesi, og eg helt, at hon lá so væl millum hasar báðar steinarnar."

Og síðani hálsfevndust hesir brøðurnir í Harranum mitt á gólvinum. Tað var ein hjartanemandi løta.

Eitt av Jesu nøvnum er Immanuel, og tað merkir: „Gud við okkum." Matt. 1,23.

Gud sigur: „Eg skal als ikki sleppa tær, og á ongum sinni fara frá tær." Hebr. 13,5.

Trúgv tí, og liv í tí!

*Effie Campbell.*

# At taka sær meinboga av evangeliinum

Ein ateistur segði við ein trúgvandi: „Tað er tápuligt at trúgva, at Jesu blóð kann reinsa frá synd?"

Hin svaraði: „Tá ert tú samdur við Paulus ápostul!"

„Ha?" spurdi hin bilsni ateisturin.

„Jú, les bara 1. Kor. 1,18!"

Ateisturin las: „Tí at væl er orð krossins **dárskapur fyri teimum, sum glatast, men fyri okkum, sum verða frelstir, er tað Guds kraft."**

*„Tro & Fakta"* – *Effie Campbell* umsetti.

# Í einari gamlari, slitnari Bíbliu

*úr einum deyðsbúgvi stóðu hesar reglur skrivaðar:*

– Guds orð er røddin, sum eg royni at lurta eftir og fylgja.
– Guds orð er vegleiðarin gjøgnum hesa villingarsomu verð.
– Guds orð er lekidómur, matur og drekka fyri eina sjúka og hungrandi sál.
– Guds orð er kletturin, og á henda klett byggi eg vónina fyri æviga lívi mínum.
– Guds orð er styrkin í stríðnum fyri æru Harrans, frelsu menniskjunnar.
– Guds orð er hvíldarstaður hjá hinum mødda ferðamanni.
– Guds orð ber hina trúgvandi sálina gjøgnum deyðan.
– Almáttugi Gud! Takk fyri orð títt!

*Et Ord med på Vejen – Effie Campbell* umsetti.

---

## Uppgávan

Jesus gav okkum eina uppgávu: Vit skulu fara til øll fólkasløg og gera tey til lærusveinar. Matt. 28,19-20.

Sjálvt um tað ber til at náa langt við sjónvarpi og sosialum miðlum, so er neyðugt at senda menniskju út millum fólkasløg og mentanir fyri at byggja upp eitt netverk, so fólk kunnu gerast lærusveinar og fáa ein felagsskap í kirkjum.

Gud sendi ikki ein teldupost, hann sendi ein boðbera, son sín. Jesus opinberaði seg fyri Paulusi á vegnum til Damaskusar, men Jesusi tørvaði ein lærusvein, sum æt Ananias at bera Paulusi frelsuboðskapin. Gud brúkar ikki einglar sum trúboðarar. Hann brúkar menniskju. Jesus gjørdist hold og blóð og tók bústað okkara millum.

*Effie Campbell* umsetti.

---

**Sunnudagsblaðið** er eisini at finna á alnetinum á donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum. Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23. apríl | **Tekstur:** | Jónas 1-4 | **Bíbliuorð:** | Jón. 2,10b |
| 30. apríl | **Tekstur:** | 1. Kong. 17, 1-16 | **Bíbliuorð:** | Luk. 1,37 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74




**Nr. 10** *7. mai 2023* **83. árg.**

# Ein bønhoyring

Sum diakonur (hjálparprestur) stúrdi eg ofta fyri útkomuni. Lønin, eg fekk, var alt ov lítil at uppihalda mær og mínum. Eg undirvísti nakrar tímar yviri í skúlanum, og á tann hátt fekk eg eina eykainntøku. Men pengarnir rukku ikki til.

Serliga ein harðan vetur vóru vit illa stødd. Tað var ein leygardag, meðan eg sat og hugsaði um taluna til sunnudagin. Tá kom kona mín inn við fleiri rokningum frá bakaranum, slaktaranum og fleiri øðrum. Til saman bleiv tað 100 rublar. „Jú, eg skal gjalda hetta,“ segði eg, men hevði ikki ein einasta rubul í kassanum. Og eg helt á at skriva. Men stúranirnar órógvaðu meg. Eg fór á føtur og gekk yvir til vindeygað. Tá kom brádliga ein ravnur flúgvandi við einum kjøtstykki. Ravnurin setti seg á eina tekju beint yvirav og fór at eta. Eg suffaði: „Harri, tú sum gevur ravnsungunum teirra føði, gev eisini okkum tað, sum okkum tørvar! Amen!“

Eftir hesa bønina fall friður á meg, og eg kundi aftur seta meg við skriviborðið. Tá bankaði onkur á hurðina, og grannin, ein ríkur heilsølumaður, kom inn. Hann heilsaði blídliga og spurdi, hvussu vit høvdu tað, og um tað var okkurt, hann kundi hjálpa okkum við. Um eg var í neyð, so skuldi eg endiliga siga honum tað, so skuldi eg fáa tað, sum mær tørvaði.

Eg var alt ov stoltur at siga hesum manni, hvussu mín støða var, serliga tí eg visti, at hann ongantíð kom í kirkju. Og hesin vónbrotni maðurin mátti fara. Men ikki vardi leingi, til heilsølumaðurin kom aftur. Hann legði ein brævbjálva á borðið og segði næstan avgjørdur á málinum: „Ger so væl, hesin skal vera her!“ So fór hann. Eg læt brævbjálvan upp, og 100 rublar lógu í honum. Tað var júst tað, okkum tørvaði.

Sunnumorgun fór eg inn til grannan og takkaði fyri hesa kærkomnu gávuna. „Harrin, Gud okkara, hevur brúkt tygum í einari einglatænastu," segði eg. Tá ið hann spurdi meg hvussu, segði eg honum søguna um ravnin, og hvussu Gud hevði bønhoyrt meg.

„Er tað gjørligt," rópti hann, „at Gud er so livandi, so nær, so mektigur?" Og so segði hann mær, at tá ið hann taldi pengakassan upp dagin fyri, brádliga hevði fingið ta hugsan: „Tú mást taka nakrar pengar við tær." Og tað gjørdi hann uttan at vita hví. „Tá ið eg gekk framvið her," helt hann fram, ljóðaði tað: „Tú mást fara at vita, hvussu grannin hevur tað," og eg var til reiðar at hjálpa tygum á ein ella annan hátt. Men tá ið tygum so kaldliga vístu mær burtur, vágaði eg ikki at bjóða tygum okkurt ávíst. Men tá ið eg var komin nøkur fet frá húsum tygara, ljóðaði ein avgjørd rødd: „Tú mást beinanvegin geva grannanum teir 100 rublarnar," og tá gav eg tygum pengarnar, sum tygum høvdu bílagt frá Gudi."

Mær nýtist ikki at leggja nakað afturat. Bønhoyringin, tann sælasta vissan, at eygu Harrans hvíldu yvir húsi mínum, var ikki bara trúarstyrkjandi fyri meg, men bleiv eisini ein hjálp fyri vin mín.

*Effie Campbell* umsetti.

# Bíbliuútbreiðsla – Sáðkornið er Guds orð

*Gunnar Andås*

Í 1936 lá ein amerikumaður, sum æt Willian Chapman, álvarsliga sjúkur á einum sjúkrahúsi í Chicago. Ein elstibróðir í samkomu hansara fór at vitja hann á sjúkrahúsinum, og hann bað Gud eira lívi Williams og leiða hann inn í eina tænastu fyri Harran. William vildi fegin gerast frískur, men hina helvtina av bønini legði hann minni í.

Eftir sum tímarnir gingu, batnaði William meir og meir, og tá gjørdi hann eina avtalu við Gud, at um Hann vildi gera seg heilt frískan aftur, so skuldi hann brúka restina av lívi sínum í Harrans tænastu. Í 1938 keyptu William og kona hansara, Betty, 1000 Bíbliur, og fóru tey nú at ganga hús úr húsi at spyrja fólk, um tey áttu eina Bíbliu. Um tey søgdu nei, so spurdu tey: „Um eg gevi tær eina Bíbliu, vilt tú so lova mær at lesa í henni?"

Sum tíðin leið, komu fleiri upp í hetta arbeiðið, og í dag arbeiðir hetta felagið BLI (Bible League International) í meir enn 40 londum kring heimin. Tey arbeiða við bíbliutýðing, at býta út Bíbliur, tey gera tilfar til bíbliugranskan og skeið, sum eru evnað soleiðis, at bíbliutekstirnir eru egnaðir at læra upp fólk, sum eru analfabetar, kynstrið at lesa eftir hesum tekstum.

Nógvir vitnisburðir verða sendir til BLI, sum boða frá tí ovurstóra týdningi, hetta missiónsarbeiðið hevur.

*Effie Campbell* umsetti.

# Sannleikin um rættvísina

Tað er satt, at eg eri ikki rættvísur – men Sannleikin (t.e. Jesus) kunnger, at eg eri rættvísur!

Tá ið Martin Luther var munkur í Wittenberg, mólu tankar hansara um hetta: „Hvussu finni eg ein náðigan Gud?“ Luther fann svarið, tá ið hann las Paulusar bræv til rómverjar. Har uppdagaði hann, at **menniskjað verður rættvísgjørt við trúgv eina, og bara við trúgv, ikki við gerningum**.

Tað er lívsneyðugt, at Gud eisini opinberar fyri okkum tað, sum Luther uppdagaði. Annars høvdu vit altíð roynt at liva upp til Guds standard – uttan at tað lukkast – og í staðin høvdu vit livað undir einum myrkum fordømingar oki.

„Tað er nevniliga eingin munur á fólki. Eingin livir, sum Gud vil, og øll eru farin langt burtur frá honum.“ Róm. 3,23 N.S. Og jú meira vit royna at liva upp til Guds standard við at halda boð og reglur, jú meira uppdaga vit sannleikan í Róm. 3,20: „Gud tekur ikki ímóti okkum, av tí at vit halda lógina. Men lógin er givin okkum, so at vit skulu vita, at vit øll bróta hana.“ N.S.

So menniskju, Satan og eg sjálvur kunnu lættliga finna feilir og mistøk hjá mær – í tanka, orði og gerningi – og siga, at eg eri ikki eitt rættvíst menniskja – mált eftir menniskjansligum standardi.

Men so trínur Sannleikin (t.e. Jesus) inn á pallin, og vegna Jesu fullgjørda verk á Golgata sigur hann til ein og hvønn, sum trýr á Jesus Kristus, Guds son: „Men nú hevur Gud víst okkum, hvussu hann tekur ímóti okkum uttan lóg. Vit kunnu lesa um tað í Bíbliuni. Gud tekur ímóti okkum, tá ið vit trúgva á Kristus, og her er einki undantak.“ (Róm. 3,21–22 N.S.)

Og vers 26: „Gud rættvísger tann, sum hevur trúgv á Jesus.“ Og vers 28: „Eitt menniskja verður rættvísgjørt av trúgv uttan lógargerningar.“ Sjálvt um tað er satt, at vit ikki standa mát og eru við undirlutan, minst so til hetta:

Sannleikin (t.e. Jesus) kunnger og sigur, at tú ert rættvísur við trúnni á Kristus! Og tað er eingin fordøming fyri tey, sum eru í Kristi Jesusi. (Róm. 8,1). Gud signi teg at grípa um henda vælsignaða og frígerandi sannleikan!

*Effie Campbell* umsetti.

# Tíðin

*Rolf Slot-Henriksen, sóknarprestur*

Urini nú á døgum geva menniskjum ta følsku vón, at tíðin á hesi jørð er uttan enda. Pinnarnir á urinum steðga ikki teirra gongd, tá ið teir eru komnir eina ferð runt á skivuni. Haraftur-ímóti minnir tímaglasið menniskjurnar á, at einaferð vil síðsta sandkornið vera fallið og lívið útrunnið. Tað síðsta sandkornið er síðsti tímin hjá eini menniskju.

Upplivingin av tí guddómliga og stórleikanum í „nú-inum“, í løtuni – er okkurt, sum alt ov fá kenna í dag, har ikki bara vinnulívið setir tíð og pening javnt. Skýmingartímin ella tær stillu stundirnar eru fremmand fyri teimum flestu í okkara tíð. Tíðin verður „sligin í hel“ við sjónvarpi og undirhaldi. Lættisoppaundirhald og vantandi kvirra og bøn doyva og gera mannasálina dølska.

Dagsins gongulag er fullkomiliga eitt annað enn í bónda-samfelagnum, sum ikki kendi til allar hesar maskinurnar: menniskjuni livdu í sínum egna stilla lagi dag út og dag inn, ár um ár, góvu sær stundir at lurta eftir kvirruni og hugsaðu um ævinleikan sum okkurt heilt natúrligt. Tað eru ikki bara tvær øldir, sum standa ósambæriligar hvør yvir av aðrari, men tveir ymiskir mátar at skilja tíðina og lívið uppá.

*Effie Campbell* umsetti.

---

Takk, Harri, at tín dýrd fyllir Himmalin, men at tín kærleiki røkkur jørðina. *e.c.* ums.

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|
| 7. mai | **Tekstur:** | 1. Kong. 18, 17-39 | **Bíbliuorð:** | 1. Kong 18,39b |
| 14. mai | **Tekstur:** | Dán. 1,18-20; 3,1-30 | **Bíbliuorð:** | 2 Mós. 20,3 |

**Útgevari:** Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
**Blaðstjóri:** Jørgen Andreasen - jorgen@mission.fo
**Umbróting & prent:** Control P – tel. 35 77 74